# Todi og Zuma í góða gamla lagnum

**Men hóast teir stórspældu og fleiri ferðir vóru framvið, so eydnaðist tað ikki FCK álopsparinum at skjóta mál í Esbjerg**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*



*Eftir stigamissin hjá FCK er Brøndby nú eitt stig undan, tá liðini mikudagin tørna saman á Brøndby Stadion. Triðja árið á rað er seinasti dysturin millum liðini samstundis at rokna sum DM-finala*

Todi Jónsson verður í FCK í hvussu so er í tvey ár afturat. Tað var stóra søgan í donsku ítróttarpressuni seinnapartin fríggjadagin. FCK venjarin fegnaðist, áskoðararnir hjá FCK stórfegnaðust, sjálvt ítróttarstjórin, Niels–Christian Holmstrøm, tóktist ovurfegin, og Todi Jónsson sjálvur fjaldi ikki yvir, at tað kendist sum ein lætti hjá honum, at óvissan um næstu fótbóltsframtíðina við nýggju undirskriftini var burtur.

– Hetta er ein ivasamur vinnuvegur. Marknaðurin er ikki, sum hann onkuntíð hevur verið. Tí sigur tað seg sjálvt, at tað er ein lætti, at tað nú er greitt, hvar eg skal spæla fótbólt tvey tey næstu árini. Eg havi alla tíðina sagt, at eg stór trívist í FCK, og at eg alla tíðina havi vónað, at tað fór at bera til at halda fram her. Eg eri fegin um álitið, sum FCK hevur víst mær, og eg vóni, at eg verði førur fyri at rinda felagnum og áskoðarunum, sum hava stuðlað mær so væl, nakað aftur, var viðmerkingin hjá Toda Jónsson, tá ið tíðindini bórust um, at nú var nýggjur sáttmáli komin upp á pláss.

Todi Jónsson vil einki siga um sáttmálasamráðingarnar, og tað vil leiðslan í FCK heldur ikki. Men tað er neyvan nógv við síðuna av, tá ið vit gita, at báðir partarnir, sum hava staðið so stívir fyri hvørjum øðrum, hava givið seg. Todi vildi hava longri sáttmálaskeið enn tvey ár, men tað vildi FCK ikki. Nú er skeiðið tvey ár, og tað hevur FCK ivaleyst rindað eitt sindur meiri fyri, enn teir í fyrstu atløgu ætlaðu sær at gera. Men hetta eru gitingar.

### Brennivargur

Undan útidystinum í Esbjerg segði FCK venjarin, Hans Backe, at hann roknaði Toda Jónsson sum lyklaspælara. Todi var í álopinum saman við Zuma, og teir funnu hvønn annan so mikið væl, sum teir plagdu at gera síðsta heyst, tá ið FCK vann seg fram til tryggan oddasess.

Todi spældi Zuma leysan, men hann misnýtti, og Zuma og fleiri aðrir spældu Toda leysan frammanfyri Esbjerg málið, men tað eydnaðist ikki at fáa mál. Todi hevði fýra risa stórar møguleikar. Hann stútaði úr góðari støðu við síðuna av málinum, hann sendi upp um tvørtræið, málverjin bjargaði eina ferð, og dygst undan útskiftingini í 86. minutti, fór bólturin millum beinini á Toda.

Í BT fær annars væl upplagdi føroyski álopsspælarin av grovfíluni, tí hann ikki megnaði at skora mál í Esbjerg: “Todi Jónsson, en færing i København, var helt suveræn og blev lørdagens indiskutable stor pyroman i 0–0 kapmen”, er salvan, sum ítróttarmaðurin hjá BT í Jyllandi, Ib Pilegaard, gevur Toda Jónsson. Og tá ið hann býtir karakterir út, er hann ikki í gávuhýri ímóti Toda. Føroyski álopsspælarin fær eitt fimm tal, sum er tað minsta, ið nakar av spælarunum í Esbjerg leygardagin fekk. At tað er stutt millum topp og botn er hetta góð mynd av. Um Todi hevði havt skorað sigursmálið, so hevði hann ivaleyst fingið tíggju ella ellivu. Tí leikliga avrikið var gott.

– Eg misbrúkti møguleikarnar, sum kundu havt givið okkum sigurin og harvið framvegis oddasessin í superliguni. Nú mugu vit gera málini úti í Brøndby, sum vit ikki megnaðu at gera í Esbjerg, var viðmerkingin hjá Toda Jónsson.

Hans Backe, FCK venjarin, segði seg vera væl nøgdan við leikliga avrikið. Men hann segði seg samstundis ivast í, um Todi verður førur fyri at spæla í morgin. Metingin hjá venjaranum var, at Todi hevði nýtt so nógva orku, at hann kanska ikki fór at verða komin fyri seg mikudagin.

– Tað vóni eg sanniliga, at eg verði. Tað eru fýra dagar at koma fyri seg í, segði Todi Jónsson. Fýra minuttir undan dystarenda varð hann avloystur av Peter Møller. Men eingin ivi tykist vera um, at venjarin hevur gott eyga á Toda og ivaleyst fyrst fer at vita, um hann er førur fyri at spæla avgerandi lokaluppgerðina í annað kvøld, áðrenn hann fer at huga um aðrar møguleikar í uppstillingini.

# Óli er á veg niður

**Tað skal vilja væl til, um Hvidovre og liðformaðurin á føroyska landsliðnum ikki komandi vikuskifti fara at flyta niður í triðju deildina**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Í toppinum er alt langt síðani avgjørt. Herfølge og Frem flyta upp í superliguna. At hesi bæði feløgini ikki hava so nógv at spæla um, sást m. a. í úrslitinum hjá Herfølge í vikuskiftinum. Teir vitjaðu B93 á Eysturbrúgv, og úrslitið var 2–0 heimasigur. Harvið eydnaðist tað 110 ára gamla fyrrverandi stórfelagnum undir liðini á Parkini at tryggja sær enn eitt ár í bestu deildini.

Hvussu tað fer at tørna út hjá Hvidovre, sum fyri bara tveimum árum síðani hevði ætlanir um at flyta upp í superliguna, verður gjørt av næsta sunnudag. Tá skal Hvidovre við Óla Johannesen á liðnum spæla í Fredericia, har tað verður rættuliga torført hjá Hvidovre, sum fer at heingja vónina á, at Fredericia ikki hevur tað stóra at spæla um.

Hvidovre hevði sunnudagin møguleika fyri at sleppa sær burturúr torføru støðuni, men tað meiri enn hálvkiksaði hjá Óla Johannesen og teimum. Hvidovre hevði vitjan av AC Horsens við Johan B. Hansen á liðnum. Úrslitið var 1–1.

Hvidovre er triði aftast, og trý lið flyta niður. HIK er longu niðurflutt. Spurningurin er so, hvørjir hinir báðir niðurflytararnir verða. B1909 er í torførastu støðuni. Men sunnudagin fingu teir vónina aftur. Tá vunnu teir reyðu 3–2 á teimum bláu í B1913. Grannauppgerðin varð flutt á Odense stadion, har 4.589 áskoðarar mintust aftur á tíðina, tá ið tey bæði árstalsfeløgini vóru millum tey stóru í Danmark. Í hvussu so er annað teirra fer at flyta niður og kanska bæði. Um talan bara verður um annað teirra, so verður Hvidorve síðsti niðurflytarin.

Í síðsta umfarinum skal B1909 spæla á útivølli ímóti niðurflutta HIK, og B1913 skal á heimavølli spæla ímóti Randers Freja.



# Molde er stak illa fyri

**Í Tróndheimi fóru fimm mál ígjøgnum hjá Eddie Gustafsson,og nú er Molde væl nærri botninum, enn teir eru toppinum**

NOREG
*Jóannes Hansen*



*Har var eingin ivi um úrslitið, tá Molde leygardagin vitjaði í Rosenborg. Heimaliði vann ikki minni enn 5-0*

Jákup Mikkelsen er eftir landsdystin ímóti Týsklandi komin aftur til Noregs og Molde. Steðgurin verður bara tvær vikur. Um mánaðarskiftið verður sáttmálaskeiðið hjá føroyska landsliðsmálverjanum og Molde runnið. Vónirnar hava verið, at Molde skuldi kappast við Rosenborg um norska meistaraheitið, men hetta verður av ongum. Felagið, sum Jákup nú fer at biðja farvæl, er meiri átókt botnfelag, heldur enn felagi, sum er við í stríðnum um meistaraskapin.

Leygarkvøldið var Molde í Tróndheimi og spældi ímóti oddaliðnum Rosenborg. Eddie Gustafsson var í Molde málinum, og hann noyddist fimm ferðir í meskarnar eftir bóltinum. Molde megnaði ikki at skora. Rosenborg hevur 28 stig og er tíggju stig frammanfyri næsta kappingarneytan, Stabæk. Molde er sætti aftast, nú tíggju umfør eru avgreidd.

Gamla føroyska felagið, Sogndal, hevur staðið seg hampuliga væl. Sunnudagin vunnu teir størsta sigurin nakrantíð í tippuliguni. Odd Grenland varð sent aftur til Skien við 5–0 tapi í viðførinum. Sogndal hevði annars ikki vunnið í fýra teimum síðstu dystunum.

Viking javnaði til 1–1 í yvirtíðini, tá ið teir í Stavanger høvdu vitjan av Lillestrøm. Brann Bergen var frammanfyri 3–0 á heimavølli ímóti Stabæk, men so steðgaði alt upp hjá heimaliðnum, og úrslitið var 3–3. Aalesund hevur tað strevið, nú teir royna seg í bestu deildini. Hesa ferð taptu teir 2–0 á heimavølli ímóti Bodø/Glimt. Lyn vann 1–0 í Tromsø.

### Danska superligan

| | d | v | - | j | - | t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brøndby (M) | 31 | 15 | - | 11 | - | 5 | 58 | 30 | 28 | 56 |
| 2 FCK | 31 | 15 | - | 10 | - | 6 | 46 | 31 | 15 | 55 |
| 3 Esbjerg | 31 | 12 | - | 10 | - | 9 | 64 | 55 | 9 | 46 |
| 4 Farum | 31 | 14 | - | 3 | - | 14 | 46 | 57 | -11 | 45 |
| 5 FCM | 31 | 11 | - | 10 | - | 10 | 46 | 41 | 5 | 43 |
| 6 OB (S) | 31 | 10 | - | 12 | - | 9 | 49 | 46 | 3 | 42 |
| 7 AB | 31 | 10 | - | 11 | - | 10 | 40 | 43 | -3 | 41 |
| 8 Viborg | 31 | 10 | - | 10 | - | 11 | 52 | 53 | -1 | 40 |
| 9 AaB | 31 | 12 | - | 4 | - | 15 | 40 | 45 | -5 | 40 |
| 10 AGF | 31 | 10 | - | 9 | - | 12 | 47 | 54 | -7 | 39 |
| 11 Silkeborg | 31 | 8 | - | 9 | - | 14 | 45 | 47 | -2 | 33 |
| 12 Køge | 31 | 8 | - | 3 | - | 20 | 43 | 74 | -31 | 27 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jón Rói Jacobsen (Brøndby)

### Danska 1. deild

| | d | v | - | j | - | t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Herfølge | 29 | 21 | - | 3 | - | 5 | 70 | 37 | 33 | 66 |
| 2 Frem | 29 | 17 | - | 4 | - | 8 | 61 | 41 | 20 | 55 |
| 3 Fredericia | 29 | 13 | - | 9 | - | 7 | 49 | 29 | 20 | 48 |
| 4 Randers F. | 29 | 14 | - | 6 | - | 9 | 62 | 49 | 13 | 48 |
| 5 Skjold | 29 | 14 | - | 4 | - | 11 | 49 | 35 | 14 | 46 |
| 6 Vejle | 29 | 14 | - | 4 | - | 11 | 62 | 57 | 5 | 46 |
| 7 HFK Sønderj. | 29 | 12 | - | 8 | - | 9 | 61 | 53 | 8 | 44 |
| 8 Ølstykke | 29 | 11 | - | 8 | - | 10 | 64 | 57 | 7 | 41 |
| 9 FC Aarhus | 29 | 12 | - | 4 | - | 13 | 50 | 52 | -2 | 40 |
| 10 AC Horsens | 29 | 9 | - | 9 | - | 11 | 45 | 48 | -3 | 36 |
| 11 Brønshøj | 29 | 10 | - | 6 | - | 13 | 44 | 50 | -6 | 36 |
| 12 B 93 | 29 | 9 | - | 6 | - | 14 | 43 | 52 | -9 | 33 |
| 13 B 1913 | 29 | 8 | - | 6 | - | 15 | 37 | 57 | -20 | 30 |
| 14 Hvidovre | 29 | 7 | - | 8 | - | 14 | 34 | 56 | -22 | 29 |
| 15 B 1909 | 29 | 7 | - | 7 | - | 15 | 51 | 72 | -21 | 28 |
| 16 HIK | 29 | 5 | - | 6 | - | 18 | 35 | 72 | -37 | 21 |

Føroyskir leikarar: Atli Gregersen (Randers Freja),
Johan Byrial Hansen (AC Horsens), Óli Johannesen (Hvidovre)

### Norska tippeligan

| | d | v | - | j | - | t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Rosenborg | 10 | 9 | - | 1 | - | 0 | 28 | 5 | 23 | 28 |
| 2 Stabæk | 10 | 5 | - | 3 | - | 2 | 17 | 11 | 6 | 18 |
| 3 Bodø/Glimt | 10 | 5 | - | 3 | - | 2 | 15 | 10 | 5 | 18 |
| 4 Viking | 10 | 4 | - | 5 | - | 1 | 18 | 11 | 7 | 17 |
| 5 Sogndal | 10 | 5 | - | 2 | - | 3 | 19 | 14 | 5 | 17 |
| 6 Lyn | 10 | 4 | - | 3 | - | 3 | 16 | 17 | -1 | 15 |
| 7 Odd Grenland | 10 | 4 | - | 2 | - | 4 | 15 | 21 | -6 | 14 |
| 8 Bryne | 9 | 4 | - | 0 | - | 5 | 20 | 14 | 6 | 12 |
| 9 Molde | 10 | 3 | - | 2 | - | 5 | 11 | 16 | -5 | 11 |
| 10 Lillestrøm | 10 | 2 | - | 5 | - | 3 | 9 | 15 | -6 | 11 |
| 11 Vålerenga | 9 | 2 | - | 3 | - | 4 | 10 | 12 | -2 | 9 |
| 12 Brann | 10 | 1 | - | 4 | - | 5 | 10 | 22 | -12 | 7 |
| 13 Aalesund | 10 | 0 | - | 5 | - | 5 | 12 | 19 | -7 | 5 |
| 14 Tromsø | 10 | 1 | - | 2 | - | 7 | 14 | 27 | -13 | 5 |

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)

### Íslendska Landsbankadeildin

| | d | v | - | j | - | t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fylkir | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 8 | 2 | 6 | 9 |
| 2 KA | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 7 | 5 | 2 | 7 |
| 3 KR | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 4 | 5 | -1 | 7 |
| 4 Þróttur | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 6 | 6 | 0 | 6 |
| 5 ÍBV | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 6 | 7 | -1 | 6 |
| 6 Valur | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 6 | 7 | -1 | 6 |
| 7 FH | 4 | 1 | - | 2 | - | 1 | 5 | 4 | 1 | 5 |
| 8 ÍA | 4 | 1 | - | 2 | - | 1 | 4 | 3 | 1 | 5 |
| 9 Grindavík | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 4 | 8 | -4 | 3 |
| 10 Fram | 4 | 0 | - | 2 | - | 2 | 4 | 7 | -3 | 2 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA)

# Silkeborg flytir niður

**Stórfeløgini í Århus og Aalborg vunnu sunnudagin týdningarmikil stig og fingu harvið trygd fyri, at tey eisini næsta kappingarár fara at spæla í bestu deildini**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað lætnaði sunnudagin orduliga hjá teimum í Århus og Aalborg. AGF og AaB hava leingi verið í vanda fyri at flyta niður, og tað hevur hingið sum myrkt skíggj omanfyri fótbóltshugaðu eftir donskum viðurskiftum stóru býirnar.

Sunnudagin var AGF í Ikast og spældi ímóti FCM, og AaB var í Farum. Í Ikast endaði tað 1–1, og í Farum vann AaB 3–1. Samstundis vann Viborg á útivølli í Silkeborg 3–2. Undan tveimum teimum síðstu umførunum er Silkeborg seks stig aftanfyri næstu liðini omanfyri niðurflytingarstrikuna. Harvið er heilt greitt, at Silkeborg fer at flyta niður saman við Køge, og at AaB, AGF og Viborg framhaldandi kunnu kalla seg fyri superligu feløg. Tað hevur leingi verið ivi um hesi heitini.

Eftir sigurin í Farum og harvið trygdina fyri framhaldandi tilveru í bestu deidini boðaði AaB venjarin, Poul Erik Andresen, frá, at hann ikki fer at halda fram í starvinum. Tískil verður tað neyðugt hjá AaB nú í summarsteðginum at finna nýggjan venjara. Í øllum hinum feløgunum í superliguni verður eftir øllum at døma talan um sama róðursmann eftir summarsteðgin, sum hevur havt ábyrgdina higartil í ár. Um okkurt óvæntað skifti verður í summarsteðginum fæst at síggja.

Silkeborg hevur verið partur av bestu deildini seinastu fimtan árini. Teir hava rættuliga verið við til at mynda superliguna. Silkeborg hevur vunnið DM, og teir hava vunnið silvur og bronsu. Fyri tveimum árum síðani vunnu teir steypafinaluna. Køge hevur bara verið eitt ár í bestu deildini.

### Spenningur um málmin

Um tað verður Brøndby ella FCK, sum fer at standa við gullkrónunum næsta sunnudag er framvegis ógreitt. Brøndby er við 56 stigum eitt undan FCK. Harvið verður Brøndby meistari, um teir vinna innanhýsis uppgerðina ímóti FCK mikukvøldið, og tað verður ivaleyst eisini nóg mikið hjá Brøndby, um teir megna javnleik mikukvøldið.

Í 33. og síðsta umfarinum, sum verður spælt sunnudagin, fer FCK at hava vitjan av AGF, meðan Brøndby skal vitja júst niðurfluttta Silkeborg.

Brøndby er rættuliga í hopla. Tað vístu teir sunnudagin. 18.139 áskoðarar sóu teir gulu og bláu – uttan Jón Róa Jacobsen á vøllinum – spæla OB sundur og saman og vinna 4–0. OB hevði ongar serligar málmøguleikar, meðan Brøndby kundi havt skorað tvær og tríggjar ferðir afturat.

Tað er framvegis spenningur um bronsukrónurnar. Men nógv bendir á, at tað verður Esbjerg, sum fer at vinna tær. Fótbóltsfepurin í Esbjerg er hægri, enn hann hevur verið seinastu fjórðings øldina. Leygardagin vóru fleiri enn tíggju túsund og hugdu, tá ið FCK vitjaði. Undirhaldið var fínt, men tað komu eingi mál. Fyri Esbjerg var úrslitið ikki so galið. Esbjerg kappast við FCM og Farum um bronsukrónurnar. Farum tapti 3–1 á heimavølli ímóti AaB, og FCM megnaði ikki meiri enn 1–1 á heimavølli ímóti AGF.

Køge hevði vitjan av AB, sum vann 3–2. At Køge og Silkeborg eru flutt niður hevur við sær, at javnvágin í superliguni millum høvuðsstaðin og provinsina verður broytt eitt sindur til fyrimunar fyri høvuðsstaðin. Herfølge og Frem flyta upp. Herfølge er úr Køge kommunu stutt sunnanfyri Keypmannahavn, og Frem er úr Keypmannahavn.